Fróðskaparsetur Føroya

Setursskrivstovan

# Leysalærarasamsýningar

**Samtyktar á setursráðsfundi 26.5. 2005**

Leysalærarar, sum undirvísa á Fróðskaparsetrinum, fáa løn fyri sjálva undirvísingina samsvarandi ásetingunum í sáttmálanum millum Magistarafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Knýtt at hesum arbeiði er annað arbeiði, sum ikki er nevnt í sáttmálanum. Hetta er alt arbeiði, sum er knýtt at undirvísingini: fyrireiking av nýggjum skeiðum, gerð av uppgávum og uppgávuvegleiðing.

Niðanfyri eru ásetingar fyri, hvussu hetta skal samsýnast. Viðvíkjandi gjaldi fyri rætting av próvtøkuuppgávum, verður víst til reglur fyri próvdómarasamsýningar, samtyktar av setursráðnum 26.5.2005.

Tað áliggur deildunum at kunna leysalærarar um hesar reglur áðrenn skeiðsbyrjan, so tað er greitt, hvussu ymsu arbeiðsuppgávurnar verða samsýntar.

**Bólkur 1:**
Fyrireiking av nýggjum skeiðum: Leysalærari kann í ávísum førum fáa gjald fyri at vera við til at leggja nýggj skeið til rættis. Tímatalið (max.) verður ásett av deildini og tikið við í leysalæraraavtaluna.

**Bólkur 2:**
Gerð av próvtøkuuppgávum: Leysalærari fær gjald fyri gerð av próvtøkuuppgávum – tímasatsur 1. Tímatalið (max.) verður ásett av deildini og tikið við í leysalæraraavtaluna.

**Bólkur 3**
Uppgávuvegleiðing: Eftir avtalu kann leysalærara verða veitt gjald fyri vegleiðing av studentum til Bachelor/Master ritgerðina – tímasatsur 1. Tímatalið (max.) verður ásett av deildini, áðrenn vegleiðing fer fram.

Í førum har ikki ber til at bólka arbeiðið innan omanfyri nevndu bólkar, skal avtala verða gjørd frammanundan um møguliga samsýning